# Slepti eg trolinu



*- Tá veðrið er ringt, hugsi eg um hvat hendi henda minniliga fríggjadagin út fyri Lofoten. Jú, eg havi nógv at takka fyri, at eg kom livandi frá tí, sigur Fríði Marston Petersen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**– Eg hugsaði bara eitt, meðan eg lá her í kalda sjónum: "Slepp for alt í verðini ikki trolinum". Um eg misti takið, so var illa statt og deyðin mær vísir, sigur 35 ára gamli skopuningurin, Fríði Marston Petersen. Fyri trimum árum síðani varð hann sligin fyri borð úr norskum trolara, og lá í sjónum í 20 minuttir. Á undurfullan hátt varð hann bjargaður. Á fyrsta sinni sigur hann frá øllum tí, sum hendi**

SJÓLÍV
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Fríði var til arbeiðis á dekkinum umborð á norska trolaranum Atlantic Star ein kaldan novemberdag í 2004.

Meðan teir eru í ferð við at kasta trolið út, fær trolarin ein ordans skvamp. Gronin verður lyft upp og hekkan so langt niður, at sjógvur fossaði inn á dekkið.

Hetta kom so óvart á, at hann verður drigin út, fastkrøktur í trolið. Í vindi, aldu og kulda stríddist hann fyri at bjarga lívinum.

Eftir áheitan frá monnum sum hava við sjógvin at gera og kenna Fríða, ynskir hann nú at siga frá hendingini. Ein hending, sum lættliga kundi gjørt eina 10 mánaðar gamla gentu faðirleysa.

– Ja, eftir røttum átti eg ikki at kunna sitið her og greitt tær frá hesi hendingi. Prosentvísi møguleikin at sleppa við lívinum, tá ein soleiðis verður slongdur fyri borð, er nærum null. Men eg var sera heppin.

– Mín tími var ikki komin. At Várharra hevur ásett okkara livitíð her á fold, tað eri eg vitni uppá. Hann er

*Halt munn, - tað er jú stór skomm at vera sligin út*